VALGREINAR

Fólk við breki

Rúna Sivertsen
valevni Fólkafloksins í Norðoyggjum

- tey, ið bera brek skulu eftir førimuni hava frælsi til sjálvi at leggja egin viðurskifti til rættis
- tey skulu hava umstøður, sum ger tey før fyri at hava arbeiði og trívast
- samferðslutól, vegir og bygningar skulu vera soleiðis, at rørslutarnað frítt kunnu ferðast til og frá
- privat og almenn arbeiðspláss skulu hava skyldu til at lata arbeiðsplássini upp fyri teimum, ið bera brek
- fólk, ið hava endurútbúgving fyri neyðini, skulu fáa hana lætt og skjótt

Er barnafamiljan slept upp á fjall?

Jenis av Rana
valevni Miðfloksins í Suðurstreymi

Undir framløguni av valskrá Miðfloksins varð eisini løgd fram ætlan um hvussu vallyftir floksins skulu figgjast. Felags fyri valskráirnar hjá hinum flokkunum er, smb. fjølmiðlunum, at eingin teirra sigur frá hvussu lyftir teira skulu figgjast. Hetta meta vit í Miðflokkinum er ódámligt, lovar tú nakað, mást tú eisini verða førur fyri at greiða frá, hvussu tú rindar kostnaðin.

Trongstøða barnafamiljunnar
Á stevnu í norðurlandahúsinum í heyst kom fram, hvussu ómetaliga vánalig kor føroysku barnafamiljurnar hava, og dømir frá øðrum Norðurlondum, íroknað Ísland, staðfesta hetta. M.a. er í Svøríki hámark fyri hvussu nógv barnafamiljur gjalda í barnaansingarútreiðslumfyri trý børn á stovni max. kr 2.100 -og einki fyri fleiri. Í Føroyum vildi hetta lættliga kostað kr. 6.000. Barsilsskipanin í t.d. Svøríki veitir l ára løntan barsil fyri hvørt barnið, og hendan tíðin kann nýtast áðrenn barnið fyllir 7 ár. Hartil veita øll londini barnastuðul (barnakjekk) til hvørt barnið heilt til 16 og 17. árið. Og í Finlandi og Noregi verður peningur rindaður familjum, sum ikki fáa ansing til børn síni.

Tað gjørdist okkum greitt at vit eru eftirbátar á hesum týdningarmikla øki. Ei undur í at bæði føroysku foreldrini noydast at arbeiða fulla tíð- og fleiri longri.

Røkt teirra eldru
Fara vit til teirra í komin eru til hin endan av lívsleiðini, er myndin tann sama. At hesi, sum hava bygt ta vælferð, unga ættarliðið nýtir gott av, ikki skulu fáa tað røkt, heima ella á stovni, sum átti at verið sjálvsøgd, er ein skammblettur, sum má bótast, so skjótt ein nýggj samgonga fer til verka.

Fíggjanin av broytingunum
Hetta fara vit at broyta- tað er sum sagt bráneyðugt, men tað kostar, og krevur øðrvísi raðfestingar. Í framløgdu ætlan Miðfloksins vilja vit m.a. figgja hetta við at spara 10 mió. á ferðakostnaðinum hjá tí almenna. Harnæst ætla vit at spara við at samskipa granskning, sum nú liggur spjædd út á eitt ótal av konti, og á mentanarøkinum, sum sjálvandi má koma í aðru rað, tá bøtan av viðurskiftum hjá m.ø. barnafamiljum og teimum eldru, er brákravd.

Tá korini sostatt verða grundleggjandi bøtt hjá ungu familjuni, skuldi orsøkin til ikki at giftast, fyri harvið at fáa lut í almennari forsorg, verið burtur. Tí verður gjørligt eisini á hesari kontoini, sum mangan (av neyð?) verður misnýtt, at spara eitt mill. krónu tal.

Óneyðugt at siga tær, at hesar ætlanir okkara bert kunnu setast í verk við tínum stuðli- h. 20 januar.

Barsilsskipan til lesandi

Høgni Hoydal
løgtingsmaður og valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy

Barsilsskipanin var eitt stórt sosialt frambrot í Føroyum. Hon javnsetti tey á privata arbeiðsmarknaðinum við tey á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum áður høvdu fingið barsil við løn tryggjað í sínum sáttmálum.

Tjóðveldisflokkurin vil, at barsilsskipanin verður vard og løgd til partarnar á arbeiðsmarknaðinum at umsita, eins og ALS virkar. Saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum skulu vit áseta, hvussu barsilsskipanin verður útbygd.

Tó er ein bólkur, ið er dottin burturímillum í arbeiðinum við barsilsskipan, nevniliga tey lesandi. Meginfelag Føroyskra Studenta vendi sær í fjor til Mentamálaráðið um spurningin og hevði eisini hetta evnið á skránni á kjakfundi í heyst.

Tá varð gjørt av, at ein barsilsskipan fyri lesandi skuldi byggjast inn í lógina um lestrarstuðul. Hetta soleiðis, at lesandi foreldur fáa eitt ár eyka við lestrarstuðli. Tey kunnu so velja, hvørt tey vilja hava útgoldið dupult ella tey vilja leingja lesturin. Harafturat skulu tey so sjálvandi hava rætt til hjálp frá tí almenna, alt eftir, hvussu sosiala støðan er.

Uppskotið til barsilsskipan fyri lesandi er í gerð í Mentamálaráðnum, og Tjóðveldisflokkurin fer sjálvsagt at leggja uppskot fram um at fáa tað samtykt, tá nýtt løgting er valt.

Arbeiðarin eigur lívið í okkum

Katrin Dahl Jakobsen
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi.

Nú gongdin í búskapinum er farin skeiva vegin og framleiðslan í fiskivinnuni á landi ikki gevur tað man fegin vildi, er likt til, at summi eru farin at leita eftir syndabukkum. Okkurt er galið, og onkur skal lastast. Seinastu dagarnar hava vit lisið í blaðunum, at orsøkin kann vera, at arbeiðsmegin er ikki nóg góð.

Tú kløkkast við at lesa slíkt. Tú sært fyri tær árliga tiltakið í Norðurlandahúsinum, tá ársins virki verður kosið, og hvussu vinnandi stjóri og virkisleiðari hátíðarliga rósa og takka arbeiðsfólkinum fyri teirra lut í hesum heiðuri.

Men nú tað gongur minni væl, eru rósandi røddirnar tagnaðar. Nú fer man eftir arbeiðsfólkinum. Eg eri ikki virkisbúskaparfrøðingur ella frøðingur av nøkrum slag. Men eg havi lisið mær til, at tá ið vinnan ikki hevur tað so gott, eru orsøkirnar ofta nógvar og torgreiddar.Tað kann vera lækkandi søluprísir, minni eftirspurningur, vánalig flutningsviðurskifti, vánaligir vinnuligir karmar, (hvat tað so er)? o.a. Felags fyri allar hesar trupulleikar er, at hesar eiga virkisleiðslur at leiða virkið ígjognum. Hetta er líkasum teirra ábyrgd í virkisbygnaðinum. Til hetta hava teir sjálvsagt ymisk amboð so sum bygningar, tól, kapital, og síðst men ikki minst arbeiðsmegina, sum virkisleiðslan skal leiða og fordeila.

Helst er ikki lætt at sigla millum skerini tá aldurnar ganga, men at kasta arbeiðaranum fyri, at tey ikki røkka til, er so púrasta skeiv adressa. Javnaðarflokkurin hevur aftur og aftur strongt á at fingið í lag arbeiðsmarknaðarútbúgvingar, fyrst og fremst til teirra, sum eru á fiskavirkjunum. Tað hevði verið skilabetri boðskapur frá virkisleiðslum at borið.

Útróðurin doyr út

Lasse Klein
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Miðalaldurin hjá útróðrarmonnunum økist. Ungdómurin leitar í storri mun til aðrar vinnur enn útróðrarvinnuna. Um stutta er tað eingin sum tímur at fáast við útróður, og vit kunnu tá øll sita á okkara skrivstovum og minnast aftur tað tíð, tá nakar var so býttur at tíma at liggja á opnum havi, kaldur, móður, sárhentur við sjóverki fyri lítla og onga hýru.

Hart lív hjá útróðrarmanninum
Sum øllum kunnugt er lívið á havinum mangan strævið og ikki minst, tá talan er um smærri útróðrar bátar. Hesi seinastu árini hevur fiskaprísurin verið góður og hava útróðrarmennirnir havt eina hampuliga inntøku, tó ikki storri enn so, at gjørligt er hjá teimum flestu at forvinna somu upphædd uppi á landi.

Tá ringur prísur er og lítið at fáa, er inntøkan hjá teimum væl minni enn hjá teimum, ið arbeiða uppi á landi. Leggur ein so afturat indoktrineringina frá lærarum og fjølmiðlum, um at útbúgving og aftur útbúgving er tað einasta rætt, er eyðsæð, at eingin av sær sjálvum gerst útróðrarmaður. Tað átti at verið meira náttúrligt, at samfelagið eyggjaði hesar ungu menn, at gerast útróðrarmenn, tí hetta eru rættir menn, ið veruliga gera nakað munagott fyri samfelagið.

Tað er ikki rætt, at øll skulu eyggjast til at sita á skrivstovu, tí tað er meira brúk fyri teimum, ið av røttum arbeiða og skapa virðir.

Útróður gerst søga
Um hugsað verður um allar forðingarnar: Umsitingarligar, peningaligar og restruktivar umframt eitt kalt, hart og buldrut lív, við ikki nevniverdari hýru í mun til arbeiði, og at samfelagið ferð eftir ferð sigur teimum ungu, at bert fólk við útbúgving hava virði, er ikki serliga sannlíkt, at føroysku grunnarnir í framtíðini verða troyttir av útróðrarbátum.

Hyggja vit 10 ella 20 ár fram, er miðalaldurin vaksin við umleið sama áramáli, um ikki okkurt munagott verður gjørt. Talið av útróðrarmonnum vil minka so hvørt sum hesir fara frá fyri aldur ella fara uppá land at arbeiða. Lítil og ongin tilgongd vil vera. Tað sum ávísir persónar í dag síggja sum eina hóttan ímótir okkara fiskigrunnar, vil tá vera søga. Vit kunnu tá øll sita á okkara skrivstovum og minnast aftur tað tíð, tá nakar var so býttur at tíma at liggja á opnum havi, kaldur, móður og sárhentur við sjóverki fyri lítlari og ongari hýru.

Hvat skal gerast
Tá vit tosa um útróðrarflotan niðanfyri 15-20 tons eiga so nógvar forðingar sum gjørligt at fáast burtur – eitt nú veiðuloyvi, herundir dagseðlarnir. Hevur ein maður hug at fiska og avreiða, so latið hann endiliga – eisini um hann hevur annað starv við síðuna av. Tað er gamalt í Føroyum at kunna rógva út partar av árinum, uttan at skula spyrja um loyvi. Eisini eigur møguleiki fyri figging at útvegast.

Vit skulu gera okkum púra greitt um vit ynskja útróður sum ein náttúrligan part av samfelagnum og ynskja vit tað, má handlast hareftir. Latum okkum ikki koma í somu støðu sum danir, ið nú noyðast at koyra ungar menn á skúlabonk fyri at hesir skulu gerast útróðrarmenn. Hetta er ein øvugt verð, tá hugsað verður um, at nógvir av okkara raskastu útróðrarmonnum júst eru nakrir av teimum, ið ikki eru serliga glaðir fyri at sita á skúlabonki.

Virðið teir heldur fyri tað sum teir eru – nevnliga góðir samfelagsstuðlar, ið eru vit til at halda samfelagnum uppi.

Føroyar fyri øll !

Soffi Egholm
valevni Javnaðarfloksins í Norðstreymoy

Nøkur av mínum hjartamálum, sum eg ynski at ávirka eru hesi:

- Betra um viðurskiftini hjá teimum sálarsjúku og teimum avvarðandi. Galdandi psykiatrilóg er frá 1938 og er út av lagi vánalig og ómennniskjanslig. Ein nýggj og tíðarhóskandi lóg skal gerast skjótast til ber.
- Betra um postviðurskiftini í Kvívíkar kommunu og í Norðstreymoy.
- Betra um sjúkrahúsviðurskiftini við at samskipa tey betri og at fáa tey undir eina meira einfalda leiðslu.
- Almannaráðið og Heilsumálaráðið skal undir eitt ráð. Hetta er sera umráðandi fyri at fáa ein meira effektivan og bíligari rakstur.
- Betra um heimarøktina og heimahjálpina.
- Betra um læknaviðurskiftini við at skapa betri karmar og endurútbúgvingar v.m til læknarnar, soleiðis at hetta verður á sama støði sum í okkara grannalondum.
- Tryggja og betra um fólkapensiónina, soleiðis at øll kunnu fáa eina rímiliga fólkapensión í aldurdómum.
- Ein kærunevnd má setast í verk skjótast til ber, sum skal koma borgarnum til góðar. Borgarin skal hava rætt til at kæra um skeivar viðgerðir á øllum økjum.
- Endurskoða og gera eina meira einfalda landsumsiting, sum er á einum meira rímiligum stoði og sum hóskar betri til okkara lítla oyggjaland.
- Gera langtíðar ætlanir fyri alt tað føroyska samfelagið, soleiðis at borgarin, vinnan og tey alment settu, kunnu føla seg meira trygg við viðurskiftini og við tann rikna politikkin. Fyri at náa hetta krevst politiskur stabilitetur & visiónir og ikki bert politiskar lappaloysnir.
- Krøv, trúðvirði og reinleiki til politikarin skal á eitt hægri stoði.

Við ynskjum um eitt gott val fyri Føroya fólk.

Atkomumøguleikar fyri øll

Elna Skylv Hansen
Valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy

Fáa brekað góðar møguleikar í ítrótti, fáa øll góðar møguleikar. Øll skulu hava javnbjóðis atkomumøguleikar til almenn stoð. Vit hava í dag eitt Ráð teirra Brekaðu, sum skal vera ráðgevandi í øllum almennum málum, sum hava týdning fyri viðurskifti teirra brekaðu. Ráðið virkar við stoði í Fyrimyndarreglum hjá ST um útvegan av javnlíkum møguleikum fyri brekað.

Hetta er eitt gott stig framá, men als ikki nóg mikið. Tann, ið er bundin at koyristóli, hevur enn ikki atkomumøguleikar í flestu almennar bygningar. Tørvur er á eini lóg ella ásetingum á hesum øki, og tað ongantíð ov skjótt. Hesum vil eg virka fyri.

Við ella uttan koyristól, so hevur tann brekaði brúk fyri at sleppa at ítróttarøkjum - bæði sum íðkandi og sum áskoðari. Ítróttur, sum er mennandi heilsuliga, kropsliga, sálarliga og sosialt, eigur at hava góðar umstøður hjá okkum - ikki minst hjá teimum, ið hava okkurt brek.

Hugstoytandi var at fylgja okkara luftmiðlum, tá ítróttaárið 2003 - Ár teirra Brekaðu - var samanumtikið og uppgjørt. Einasti føroyingurin, sum í 2003 ognaði sær heimsmet, var ikki tikin upp á tungu.

Ítróttur er eitt gott føroyskt andlit úteftir. Tað er júst føroysk luttøka í altjóða ítróttakappingum, ið mangan fær verðins eygu at venda sær móti okkara landi, og tað er tí av týdningi, at best møguligar umstøður verða tryggjaðar føroyskum ítrótti - eisini fyri brekað.

Fáa brekað góðar møguleikar í ítrótti, fáa øll góðar møguleikar.

Miðflokkurin segði nei til at blokkurin skuldi skerjast við kr. 367 milliónum (1)

Jónfinn Olsen
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

Miðflokkurin bardist á Løgtingi fyri at blokkurin ikki skuldi skerjast. Og tá skalt tú hugsa um, at Miðflokkurin sat í andstøðu hesa tíðina. Men hvat hendi tá, tásitandi samgonga avgjørdi at skerja blokkin, og søgdu at hetta fór ikki at ávirka Føroyska samfelagið. Miðflokkurin atkvøddi ímóti at hetta skuldi henda. Men tit vita nú hvat hetta hevur gjørt í okkara samfelagi, tað mangla kr. á so nógvum postum.

Hendan seinasta samgongan, sum situr nú fram til 20 januar 2004, hevur leitað eftir sparingum, síðan teir tóku við. Hetta skal man tó ikki lasta pørtum av hesi samgonguni fyri, tí tað var samgongan, sum sat framman undan sum samtykti á Føroya Løgtingi at blokkurin skuldi skerjast. Meðan hendan samgongan mátti sita eftir við avleiðingunum av hesi "beistagerð", um eg kann málbera meg so.

Miðflokkurin ynskir ikki á nakran hátt at vælferðin skal versna fyri fólkið í Føroyum. Tí hevur Miðflokkurin upp til fleiri ferbiðið um eina fíggjarliga uppgerð millum Føroyar og Danmark, so skil kann fáast á hesum viðurskiftum.

Vel Miðflokkin sum tína rødd á Løgtingi. Borgan fyri vælferð og trivnaði.

Framhald av síðu 41

- Miðnámsskúli í Vági
- 123 nýggj røktarheimspláss í næstum

Eitt herróp Miðfloksins er: á varðhaldi, tá ið á stendur:

Tað hevur mangan staðið á hesar 18 mánaðirnar.

Hvør minnist ikki almenna kjakið um rættindi teirra homosexuellu við mótmælisundirskriftum frá báðum pørtum. Miðflokkurin var á varðhaldi.

Hvør minnist ikki royndirnar at broyta rúsdrekkalógina bæði tí at veita Norrønu loyvi at skeinkja og at lata privatum loyvi til at framleiða føroyskt rúsdrekka. Miðflokkurin var á varðhaldi.

Hvør minnist ikki drúgva kjakið um fosturtøkumálið, sum framvegis er uppi í almenninginum. Miðflokkurin er á varðhaldi.

Hvør minnist ikki, at trupult var at fáa figgarlógina at hanga saman, men at Miðflokkurin vardi borg.

Vinnugrunnurin
Miðflokkurin er ítøkiligur í sínum politikki. So ítøkiligur, at flokkurin hevur eitt ítøkiligt boð uppá, hvussu vinnan við skynsomum langtíðarloysnum kann vera sær sjálvari til hjálp, tá ið eitt nú heilar vinnugreinar koma í kreppu.

Fyri nøkrum árum síðani var rækjuvinnan hønan, sum varp gulleggini. Tá var svartkjaftaflotin illa fyri og skip vórðu seld av landinum. Nú er støðan øvugt; nótaskipini hava inntøkur, sum ongantíð áður, meðan rækjuflotin er í kreppu.

Miðflokkurin skjýtur upp, at ein vinnugrunnur - hjálp til sjálvhjálp - verður settur á stovn, sum vinnan eigur og ræður yvir sjálv. Stovnsfæ grunsins skal vera t.d. 5% av skattliga yvirskotinum hjá øllum fyritøkum. Hetta verður sostatt ikki eitt eykagjald, tí fortreytin er, at eitt skattligt yvirskot er staðfest. Fyritøkur við ongum vinningi gjalda sostatt ikki í grunnin. Við tølunum úr fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 sum grundarlagi, vildi ársinntøkan hjá grunninum verið einar 30 mió. kr.

Tankin er, at tá ein heil vinnugrein kemur í kreppu av eitt nú minkandi prísum ella av ov høgum oljuprísum, skal grunnurin kunna figgja heildarloysnir til alla vinnugreinina. Ikki kreditorloysnir, sum hjálpa peningastovnunum at fáa sín pening, men loysnir, sum geva vinnuni møguleika fyri at koma burturúr kreppuni. Eitt nú felagskeyp av kvotum. Ella figging av koppingarevni móti sjúkum. Nógvir møguleikar eru.

Hví skal t.d. ein vanligur handil ella lastbilafyritøka gjalda í ein tílíkan grunn? Øll liva vit av hvørjum øðrum. Um ein vinna fer fyri bakka, t.d. rækjuvinnan, verður samlaða keypiorkan í landinum minni, og hetta gongur so útyvir handilslívið og lastbilavinnuna. Tí er hjálpin eisini hjálp til at figgja keypiorku, og tí hava øll áhuga í slíkari loysn.